# Gerðabók í sambandi við eyka-býráðsfund nr. 6/2021

**Dagfesting:** 09.06.2021 kl. 16:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Dávur Juul, Eyðun á Lakjuni, David Andreasen, Edva Jacobsen, Magni Jøkladal, Eivin Breiðaskarð og Gudny Vang

Tiltakslimir: Lillian Jacobsen og Niels Midjord, sum møttu fyri ávíkavist Sonna à Horni og Ólavur Larsen, sum høvdu forfall til eyka-býráðsfundin

Ikki møtt: Sonni á Horni og Ólavur Larsen

Onnur:

Býráðsskrivari: Henrik Weihe Joensen, kommunustjóri

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| 23/21 | 21/00199-9 | Alment útboð av lendinum á matriklunum 769b og 882b, Úti á Land, Fuglafjørður |
| 24/21 | 20/00101-6 | Bjartur Hansen -Umsókn um byggiloyvi til útbyggjan |
| 25/21 | 21/00352-8 | Lillian Jacobsen og Niels Midjord innkallaði sum tiltakslimir í sambandi við eyka-býráðsfund tann 9. juni 2021 kl. 16:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini. |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

23/21

# 21/00199-9 Alment útboð av lendinum á matriklunum 769b og 882b, Úti á Land, Fuglafjørður

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Tekniska nevnd | 25.05.2021 | 48/21 |
| 2 Býráðið | 09.06.2021 | 23/21 |

## Tilráðing

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd. |
|---|---|
| Stutt lýsing | Í sambandi við íbúðarbyggingina úti á Land, hevur Fuglafjarðar kommuna fingið eina viðmerking fyri ikki at hava bjóða lendi í sambandi við íbúðarbyggingina út í alment útboð. Víst verður til málið frá Kommunala Eftirlitinum.<br>Ætlanin er at byggja íbúðarblokk nr. 2 fyrst, hetta av praktiskum áðum í sambandi við ein arbeiðsveg oman á byggiplássið. Bygningur nr. 2 verður bygdur, tá bygningur nr. 1 er liðugur.<br>Millum bygning 1 og 2 er pláss gjørt til ein millumbygning í tveimum hæddum niðanfyri veghædd.<br>Matrikulplanurin verður sostatt í trimum matriklum, har sunnasti matrikulin verður boðin út í almennum útboði, har íbúðarbygningur nr. 2 eftir ætlan skal byggjast.<br><br>**Framhald 4. juni 2021**<br>Umsitingin hevur dagført útbjóðingarskrivið saman við viðkomandi fylgiskjølum.<br>Útbjóðingarskrivið snýr seg um alment útboð av lendi, part av matr. nr. 769b, 882b, 803, 804, 772c og litra e, í alt 1672 fermetrar sambært kunngerð um alment útboð av kommunalari fastogn.<br>Útbjóðingartilfarið er gjørt í trá við niðurstøðuna hjá kommunala eftirlitinum í mars mánað í ár viðv. verkætlanini "Íbúðarbygging úti á Land, Toftanesvegur, Fuglafjørður".<br>Byggisamtyktin fyri økið B1 úti á Land er góðkent av býráðnum 25. mars 2021, og í løtuni til góðkenningar hjá kommunala eftirlitinum, haðani umsitingin hevur fingið at vita, at nevnda lendið kann bjóðast út til almenna sølu, við tí fyrivarni, at broytingin í serstøku byggisamtyktini fyri økið B1 verður góðkent av Kommunala Eftirlitinum. |
| Bakgrund | Útboð av kommunalum lendi í sambandi við bygging av íbúðarblokki. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tilíkt** |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| | | | |
|---|---|---|---|
| | Kommunustýrislógin, kunngerð um útboð av kommunalari fastogn, byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 21/00199-7 Útbjóðingartilfar, tað er útbjóðingarskriv, skriv til tilboðsgevarar, tilboðslisti og kort av lendi | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Tekniski leiðarin mælir til, at nevndin tekur undir við útbjóðingarskrivinum, og at málið verður lagt fyri býráðið til endaliga støðutakan 27. mai 2021.<br><br>**Tilmæli 4. Juni 2021**<br>Borgarstjóri, kommunustjóri og tekniski leiðarin mæla til at býráðið góðkennir fyriliggjandi útbjóðingartilfar. | | |
| Dagf | 21. mai 2021.<br>04. juni 2021. | | |



**<u>Tekniska nevnd 25. maj 2021:</u>**
Nevndin samtykti at taka undir við útbjóðingarskrivinum, og at málið verður at leggja fyri býráðið til endaliga støðutakan 27. mai 2021.

**<u>Býráðið 09. juni 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt (9-0), at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og góðkendi fyriliggjandi útbjóðingarskriv.

**24/21**
**20/00101-6 Bjartur Hansen -Umsókn um byggiloyvi til útbyggjan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 2 Býráðið | 09.06.2021 | 24/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Teknisku nevnd |
|---|---|
| Stutt lýsing | Bjartur Hansen hevur søkt um byggiloyvi til víðkan av verandi sethúsum á Dalbøgøtu 2, matr. nr. 642, Fuglafjørður.<br>Byggingin í sambandi við víðkanina er ikki í tráð við galdandi byggisamtykt, har frástøðan til grannaongir má vera 2,5 m, og hæddin innan hendan geira ikki má koma upp um 2,5 m.<br>Tí er neyðugt at krevja grannaloyvi frá nábúgvanum Arnoldi Simonsen, sum býr fyri eystan, og frá kommununi, sum er granni fyri vestan.<br>Tá talan er um slík byggjarí, so má málið viðgerast í teknisku nevnd.<br>Ein kommunal kloakk gongur ígjøgnum ognina hjá Bjarta, sum er í ringum standi. Her má kommunan koma inn fyri at hjálpa uppá brekið.<br><br>**Ískoyti 4. juni 2021 til býráðsfundin 9. juni 2021**<br>Sambært byggisamtyktini, so skal kommunan skipa fyri grannahoyring, tá ein umsókn um byggiloyvi krevur frávik.<br>Vísandi til umsókn um byggiloyvi, so hevur umsitingin sent hoyringsskriv út til grannarnar í økinum 11. mai 2021. Víst verður til FK j. nr. 20_00101-11. Grannarnir eru eigararnir av matr. nr. 639 fyri norðan, matr. nr. 648 fyri vestan og matr. nr. 641 fyri eystan.<br>Kommunan hevur ikki fingið nakra viðmerking frá nevndu grannum í sambandi við ætlaðu byggingina á matr. nr. 642, sum er ogn hjá Bjartur Hansen.<br>Tískil kann frávik gevast fyri umsókta byggiloyvi. |
| Bakgrund | **Upprunin til málið**<br>Víðkan av verandi sethúsum. |
| Grundarlag | • **Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt**<br>Byggisamtyktin og BK17<br>• **Møgulig fylgiskjøl**<br>FK j. nr. 20/00101-1 Umsókn um byggiloyvi<br>FK j. nr. 20/00101-5 Undirskrivað grannaloyvi<br>FK j. nr. 20/00101-5 Uppskot til byggiloyvi<br>FK j. nr. 20/00101-11 Grannahoyringar |
| Viðgerð | |



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo

| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
|---|---|---|---|
| | Fíggjarligar | Ja | Ja |
| | Umsitingarligar | Ja | Ja |
| Tilmæli | Umsitingin mælir til at geva undantaksbyggiloyvi við teirri grundgeving, at sethúsini blíva dagførd í allar mátar, eisini í sambandi við brand, og at tað er eitt prýði fyri býin, og at ung fólk vilja búleikast inni í býnum.<br><br>**Tilmæli 4. juni 2021**<br>Tekniski leiðarin mælir til at útskriva undantaksbyggiloyvi sambært innsendum tekningum, dagfestar 11. februar 2020. | | |
| Dagf | 21. apríl 2020.<br>04. juni 2021. | | |

**<u>Tekniska nevnd 23. april 2020</u>**
Nevndin tekur undir við tilmælinum at geva umsøkjaranum undantaksbyggiloyvi.

**<u>Býráðið 09. juni 2021:</u>**
Býráðið samtykti einmælt, at taka undir við tilmælinum frá teknisku nevnd og geva umsøkjaranum undantaks-byggiloyvi við tí treyt, at brunaviðurskiftini eru í trá við BK17. 5

**25/21**
**21/00352-8 Lillian Jacobsen og Niels Midjord innkallaði sum tiltakslimir í sambandi við eyka-býráðsfund tann 9. juni 2021 kl. 16:00 samsvarandi § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 09.06.2021 | 25/21 |

**Tilráðing**

| Til viðgerðar í | Býráðnum | | |
|---|---|---|---|
| Stutt lýsing | Ólavur Larsen og Sonni á Horni hava forfall til eyka-býráðsfundin 9. juni 2021 kl. 16:00. Eftir teirra ynski eru tí tiltakslimirnir Lillian Jacobsen og Niels Midjord kallaðir inn til eyka-býráðsfundin. Henda innkallan sambært § 18, stk. 1 í kommunustýrislógini.<br><br>Lillian Jacobsen er fjórðvaldi limurin á lista Á við 40 atkvøðum meðan Niels Midjord er fimtvaldi limurin við 38 atkvøðum í sambandi við kommunuvalið 10. november 2020.<br><br>Býráðið skal – samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini - fyrst á fundinum 9. juni gera av, um treytirnar fyri innkallan av tiltaksliminum Lillian Jacobsen og Niels Midjord eru loknar samsvarandi § 18, stk. 3 í kommunustýrislógini. | | |
| Bakgrund | Sonni á Horni og Ólavur Larsen, býráðslimir, hava forfall til eyka-býráðsfundin 9. juni 2021 kl. 16:00. | | |
| Grundarlag | • Lógir, reglur, mannagongdir, fordømi, fíggjarligar umstøður og tílíkt **Kommunustýrislógin, kapittul 3**<br>• Møgulig fylgiskjøl **Teldubrævasamskifti við ávíkavist Lillian Jacobsen og Niels Midjord** | | |
| Viðgerð | | | |
| Tekstur íð lýsir loysn | Avleiðingar | Stuttíðar | Langtíðar |
| | Fíggjarligar | Nei | Nei |
| | Umsitingarligar | Nei | Nei |

6

| | |
|---|---|
| Tilmæli | Borgarstjórin mælir til, at Lillian Jacobsen og Niels Midjord kunnu taka sæti í Fuglafjarðar býráð í sambandi við eyka-býráðsfundin 9. juni 2021 kl. 16:00. |
| Dagf | 9. juni 2021 |

**Býráðið 09. juni 2021:**
Býráðið samtykti einmælt (7-0), at taka undir við tilmælinum frá borgarstjóranum um, at tiltakslimirnir Lillian Jacobsen og Niels Midjord taka sæti á eyka-býráðsfundinum í dag.

Fundurin lokin kl. 16:25

Gerðabókin lisin og góðkend.

7

Dávur Juul

Eyðun á Lakjuni

David Andreasen

Edva Jacobsen

Magni Jøkladal

Gudny Vang

Eivin Breiðaskarð

Lillian Jacobsen

Niels Midjord



FUGLAFJARÐAR KOMMUNA ¤ Í Støð 5 ¤ FO 530 Fuglafjørður
tlf.: 668000 ¤ teldupostur: info@fuglafjordur.fo